# P/F NORĐOYATUNNILIN

## TÓRSHAVN

## ÁRSROKNSKAPUR

## 2006

**(5. ROKNSKAPARÁR)**

**AVRIT**

# INNIHALDSYVIRLIT


Síða

Upplýsingar um felagið ..... 2

Ársfrágreiðing ..... 3

Leiðsluátekning ..... 4

Grannskoðanarátekning ..... 4

Nýttur roknskaparháttur ..... 5 - 6

Rakstrarroknskapur 2006 ..... 7

Fíggjarstøða pr. 31. desember 2006 ..... 8 - 9

Gjaldførisfrágreiðing 2006 ..... 10

Notur ..... 11 - 12

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

**Felagið**

| | |
|---|---|
| Navn: | P/F Norðoyatunnilin |
| Heimstaður: | FO-100 Tórshavn |
| Skrásetingar-nr.: | P/F 3298 |
| Skattakommuna: | Tórshavnar Kommuna |
| Stovningardagur: | 21. desember 2001 |
| Roknskaparár: | 1. januar til 31. desember |
| V-tal: | 514.543 |

**Nevndin**

Bergur í Garði, búskaparfrøðingur, Tórshavn, formaður
Jens Kári Vilhelm, verkfrøðingur, Hoyvík, næstformaður
Heri M. Hammer, verkfrøðingur, Klaksvík
Bjarni A. Bjarnason, búskaparfrøðingur, Tórshavn
Jóhanna á Bergi, MSC in management, Tórshavn

**Stjórn**

Dávid Reinert Hansen, verkfrøðingur, Oyri, stjóri

**Fíggjarleiðari**

Reinhold Isaksen, búskaparfrøðingur, Norðragøta

**Grannskoðan**

P/F Grannskoðaravirkið ***INPACT***
statsaut. revisorar
R. C. Effersøesgøta 26
Postrúm 191, FO-110 Tórshavn
Tlf.: 31 47 00 - Fax: 31 38 15
T-postur: inpact@inpact.fo
Heimasíða: www.inpact.fo

Ársroknskapurin 2006 góðkendur á felagsins aðalfundi, hin ___/_______-2007.

______________________
fundarstjóri

**ÁRSFRÁGREIÐING 2006**

**Virksemi**
Endamál felagsins er at gera tunnil millum Eysturoy og Borðoy og tilhoyrandi vegagerð, hava rakstur av tunlinum um hendi, umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

Felagsins virksemi í farna ári er at gera tunnilsarbeiði og hava eftirlit við byggiarbeiðnum. Frá upplatingardegnum 29. apríl 2006, fór felagið eisini undir regluligan rakstur og innkrevjing av nýtslugjaldi.

**Lógargrundarlag**
Partafelagið varð stovnað við 30 mió.kr. játtan á eykafíggjarløgtingslógini fyri november 2001 og heimild í Ll. nr. 168 frá 21.12.2001 um "stovnan av partafelagi at gera fast samband um Leirvíksfjørð". Ognarrættur, eftirlit, peningajáttan, nýtslugjøld, ognartøka, skattlig viðurskifti, eftiransing og kunning vórðu formaliserað í Ll. nr. 33 frá 23.03.2002 (Anleggslógin) um "fast samband um Leirvíksfjørð". Játtaðar eru 205 mió.kr. upp til 235 mió.kr. til verkætlanina við Ll. nr. 108 frá 20.12.2002 um "broyting í Ll. um fast samband um Leirvíksfjørð". Við Ll. nr. 49 frá 10.04.2003 er álagt landsstýrismanninum at leggja fram uppskot til løgtingslóg um atknýttar verkætlanir.

**Fíggjarliga gongdin**
Árið hjá felagnum royndist heldur betri enn ætlað. Ársúrslitið gjørdist eitt hall uppá kr. 34.757, í mun til eitt hall uppá 2,6 mió.kr. árið fyri.

**Menningarkostnaður**
Felagið hevur havt ávísan kostnað til at dagføra verkætlanir og kunnandi tiltøk og tilfar, ið eru kostnaðarførd.

**Íløgur**
Felagið hevur gjørt íløgur fyri 56,9 mió.kr. í tøkniogn, lendi, vegir- og undirsjóartunnil. Arbeiðið uppá sjálvan undirsjóartunnilin, við tilhoyrandi vegum og brúm, er gjørt liðugt og tunnilin er latin upp fyri ferðslu.

**Hendingar aftaná roknskaparárslok**
Frá statusdegnum og til ídag er einki hent, sum avgerandi broytir metingina av ársroknskapinum.

**Framtíðarútlit**
Nú felagið er farið undir regluligan rakstur kann roknast við støðugari inntøku. Ferðslan, ið er avgerandi fyri inntøkur felagsins, kann væntast at økjast spakuliga, men annars fylgja samfelagsgongdini. Sambært Ll. (Anleggslógini) eru játtaðar 32,5 mió.kr. árliga í tíðarskeiðinum 2007 - 2008 og 42,5 mió.kr. í 2009 ella 107,5 mió.kr. upp til 235 mió.kr. í partapeningi. Felagið fær 3,1 mió.kr. á fíggjarlógini fyri 2007 sum ískoyti til tekniskan rakstur.

**Partaeigaraviðurskifti**
Partapeningurin er 127,5 mió.kr. Allur partapeningurin er ogn landsins. Í árinum er, við eykaaðalfundarsamtykt frá 16. mars 2006, partapeningurin hækkaður við 32,5 mió.kr. við játtan á fíggjarløgtingslógini fyri 2006.

**Býtið av ársúrslitinum**
Ársúrslitið er **kr. –34.757,** ið nevndin mælir til at býta soleiðis:

| | |
|---|---:|
| Flutt úrslit frá undanfarnum árum | -6.111.917 |
| Ársúrslit 2006 | -34.757 |
| **At flyta til næsta ár** | **-6.146.674** |

**Eginpeningurin** verður nú **kr.** **121.353.326**

**LEIÐSLUÁTEKNING**

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársroknskapin við ársfrágreiðingini fyri 2006 hjá P/F Norðoyatunlinum.

Ársroknskapurin er settur upp samsvarandi ásetingum í galdandi ársroknskaparlóg.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum.

Ársfrágreiðingin og ársroknskapurin fyri 2006 verða hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, hin 25. juni 2007

Stjórn: Dávid Reinert Hansen

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nevnd: | Bergur í Garði<br>formaður | Jens Kári Vilhelm<br>næstformaður | Heri Hammer |
| | Bjarni A. Bjarnason | Jóhanna á Bergi | |

**GRANNSKOÐANARÁTEKNING**

**TIL EIGARARNAR Í P/F NORÐOYATUNLINUM**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Norðoyatunlinum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2006, sum er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Leiðslan í felagnum hevur ábyrgdina av ársroknskapinum. Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin.

**Grannskoðanin**

Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum. Hesar reglur krevja, at vit leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum. Tá ið vit grannskoða, kanna vit við stakroyndum grundarlagið undir upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Vit taka eisini støðu til nýtta roknskaparháttin og týðandi roknskaparligu metingarnar, ið leiðslan hevur gjørt, og somuleiðis, hvussu roknskapurin sum heild er gjørdur. Tað er okkara fatan, at grannskoðanin er eitt nøktandi grundarlag at byggja okkara niðurstøðu á.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2006 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2006 samsvarandi ársroknskaparlógini.

Tórshavn, hin 25. juni 2007

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisorar

Jógvan Amonsson, statsaut. revisor    Sunnuvá Bjarnastein

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

### Alment
Roknskapurin er uppsettur eftir galdandi partafelags- og ársroknskaparlóg og roknskaparkunngerð. Rakstrarroknskapurin er uppsettur eftir greinbýttum frásøguhátti og fíggjarstøðan eftir kontuhátti. Roknskaparhátturin er óbroyttur frá árinum fyri.

### Inntøkur og rakstrarkostnaður
Inntøkur og kostnaður, ið hoyrir árinum til, verður rakstrarførdur við tíðaravmarkingum.

### Fíggjarpostar
Fíggjarligar inntøkur og kostnaður eru rentuinntøkur og –kostnaður, umframt ásannaðar og ikki-ásannaðar kursbroytingar viðvíkjandi áogn og skuld í fremmandum gjaldoyra.

### Skattur
Skattur verður kostnaðarførdur við tí upphædd, sum viðvíkur ársúrslitinum. Kostnaðarførdi skatturin fevnir um aktuellan skatt av skattskylduga ársúrslitinum og javning av útsettum skatti.

### Materiell støðisogn
Vegir, brýr, undirsjóvartunnil, tekniskur útbúnaður, tøkni, rakstrartól og innbúgv eru tikin við til útvegnarvirði, frádrigið avskrivingar. (Scrap-) avhendingarvirðið, sambært § 1,4 í ”Anleggslógini”, er sett til kr. 235.000.000.

Tól, ið kosta minni enn kr. 20.000, verða kostnaðarførd.

Avskrivingarnar eru grundaðar á ætlaða brúkstíð og restvirði (livitíð) og verða gjørdar við eins stórum árligum prosentparti. Fyrsta árið verður avskrivað frá keypsmánaðinum:

| | |
|---|---|
| Vegir og undirsjóartunnil | 10 - 14 ár |
| Tøkniútbúnaður | 3 - 5 ár |
| Rakstrartól | 5 ár |
| Innbúgv | 10 ár |

### Vørugoymsla
Kubbar á goymslu eru tiknir við til útvegnarvirði og uppgjørt eftir FIFO-háttinum. Um realisatiónsvirði er lægri, verður goymslan tilsvarandi niðurskrivað.

### Áogn
Áogn til góðar er tikin við til áljóðandi virði. Avsett verður ímóti tapsvanda.

### Vøru- og tænastuskuld
Vøru- og tænastuskuld er tikin við til áljóðandi virði. Skuld í fremmandum gjaldoyra er tikin við til kurs við árslok. Kursvinningur og kurstap, bæði ásannað og ikki ásannað, eru tikin við í rakstrarroknskapinum.

**Frammanundangoldin kubbahald**
Frammanundangoldin kubbahald eru tikin við til áljóðandi virði frá byrjan og fram til roknskaparárslok.

**Trygd, kubbar**
Trygd, kubbar eru tiknir við til áljóðandi virði, svarandi til kr. 300 fyri hvønn teknaðan kubba.

**Veðhalds- og eventualskyldur**
Veðhalds- og aðrar skyldur verða upplýstar í roknskapinum.

**Gjaldførisfrágreiðing**
Gjaldførisfrágreiðing er uppsett eftir óbeinleiðisháttinum og vísir gjaldførisávirkanina frá rakstri, íløgum og fígging. Gjaldføri við ársbyrjan og við ársenda eru samansett av tøkum peningi, frádrigið saldu á rakstrarláni.

*Gjaldføri frá rakstri*
Gjaldføri frá rakstri verður gjørt upp sum rakstrarúrslitið, javnað fyri upphæddum, sum hava gjaldførisávirkan, broytingum í rakstrarkapitali og goldnum partafelagsskatti.

*Gjaldføri frá íløgum*
Gjaldføri frá íløgum eru útveganarvirði á gjørdum íløgum í støðisogn og møguligum søluupphæddum frá seldum støðisognum í árinum.

*Gjaldføri frá fígging*
Gjaldføri frá fígging umfatar broytingar í partapeningi felagsins, lánsupptøku, goldnum avdráttum og goldnum vinningsbýti til partaeigararnar.

## RAKSTRARROKNSKAPUR 2006

| | Nota | 2006 | t.kr. 2005 |
|---|---|---|---|
| **Nettosøla** | | **20.433.501** | **0** |
| Rakstrar- og fyrisitingarkostnaður | | -1.004.255 | -1.425 |
| Rakstrarkostnaður | | -2.329.223 | -1 |
| Fyrisitingarkostnaður | | -732.367 | -464 |
| **Bruttoúrslit** | | **16.367.655** | **-1.890** |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -765.756 | -790 |
| Avskrivingar | 2 | -7.661.016 | 0 |
| **Úrslit, frá primerum rakstri** | | **7.940.884** | **-2.680** |
| Rentuinntøkur o.t. | | 55.432 | 37 |
| Rentukostnaður o.t. | | -8.031.073 | -6.944 |
| **Úrslit, áðrenn skatt** | | **-34.757** | **-2.650** |
| Skattur | 5 | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | | **-34.757** | **-2.650** |

Býtið av úrslitinum sæst í ársfrágreiðingini.

**FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2006**

| OGN | Nota | 2006 | t.kr. 2005 |
|---|---|---|---|
| Lendi, vegir og undirsjóartunnil | | 363.419.605 | 316.947 |
| Tøkniogn | | 2.777.769 | 0 |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | 2 | **366.197.375** | **316.947** |
| Kubbar | | 50.803 | 465 |
| **Vørugoymslur tilsamans** | | **50.803** | **465** |
| Vøru- og tænastuáogn | | 4.407.191 | 606 |
| P/F Vágatunnilin, millumrokning | | 247.511 | 171 |
| Meirvirðisgjald | | 0 | 11.796 |
| **Áogn tilsamans** | | **4.654.702** | **12.572** |
| Innlánspeningur | | 16.066.503 | 29.966 |
| **Peningur tilsamans** | | **16.066.503** | **29.966** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **20.772.009** | **43.003** |
| **OGN TILSAMANS** | | **386.969.384** | **359.950** |

**FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2006**

| SKYLDUR | Nota | 2006 | t.kr. 2005 |
|---|---|---|---|
| Partapeningur | 3 | 127.500.000 | 95.000 |
| Flutt úrslit | 4 | -6.146.674 | -6.112 |
| **Eginpeningur tilsamans** | 3,4 | **121.353.326** | **88.888** |
| Íleggingargrunnurin fyri Føroyar | | 248.628.207 | 259.786 |
| **Langfreistað skuld tilsamans** | | **248.628.207** | **259.786** |
| Vøru- og tænastuskuld | | 11.032.169 | 11.276 |
| Meirvirðisgjald | | 913.280 | 0 |
| Frammanundangoldin kubbahald | | 4.056.672 | 0 |
| Trygd, kubbar | | 984.900 | 0 |
| Bankaskuld | | 830 | 0 |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **16.987.851** | **11.276** |
| **Skuld tilsamans** | | **265.616.058** | **271.062** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | | **386.969.384** | **359.950** |

## GJALDFØRISFRÁGREIÐING 2006

| | 2006 | t.kr. 2005 |
|---|---|---|
| Úrslit, av primerum rakstri | 7.940.884 | -2.680 |
| Avskrivingar | 7.661.016 | 0 |
| | **15.601.900** | **-2.680** |
| Broytingar í ogn í umferð | | |
| Vørugoymsla, kubbar | 414.497 | -465 |
| Vøru- og tænastuáogn | 7.917.253 | -1.787 |
| Broytingar í stuttfreistaðari skuld | | |
| Frammanundangoldin kubbahald | 4.056.672 | 0 |
| Vøru- og tænastuskuld | 669.044 | 6.727 |
| Bankaskuld | 830 | 0 |
| **Gjaldførisúrslit, frá primerum rakstri** | **28.660.196** | **1.796** |
| Rentuinntøkur | 55.432 | 37 |
| Rentukostnaður | -8.031.073 | -7 |
| **Gjaldførisúrslit, frá rakstri** | **20.684.554** | **1.826** |
| Íløgur - undirsjóartunnil | -54.133.201 | -148.478 |
| Íløgur - tøkniogn | -2.777.769 | 0 |
| **Gjaldførisúrslit, eftir íløgur** | **-36.226.416** | **-146.653** |
| Teknaður partapeningur | 32.500.000 | 32.500 |
| Inngjøld, trygd kubbar | 984.900 | 0 |
| Broyting, lán Íleggingargrunnurin | -11.157.748 | 135.258 |
| **Gjaldførisúrslit, eftir fígging** | **-13.899.263** | **21.106** |
| Tøkur peningur, primo | 29.965.767 | 8.860 |
| **Tøkur peningur, ultimo** | **16.066.503** | **29.966** |

## NOTUR TIL ROKNSKAPIN

| | 2006 | t.kr. 2005 |
|---|---|---|
| **Nota 1. Starvsfólkakostnaður** | | |
| Lønir | 697.922 | 734 |
| Eftirlønir | 43.508 | 44 |
| Almenn lønargjøld | 21.811 | 13 |
| Starvsfólkakostnaður | 2.515 | 0 |
| | **765.756** | **790** |
| Harav til: | | |
| Stjórn | 441.602 | 442 |
| Nevnd | 256.320 | 292 |
| Ársverk felagið hevur havt er umleið | 2 | 2 |

| **Nota 2. Materiell støðisogn** | Lendi, vegir og undirsjóartunnil | Tøkni og maskinur | Tilsamans | |
|---|---|---|---|---|
| Virði 01.01.2006 | 316.947.420 | 0 | 316.947.420 | |
| Tilgongd 2006 | 53.705.852 | 3.205.118 | 56.910.970 | |
| **Virði 31.12.2006** | **370.653.272** | **3.205.118** | **373.858.390** | **0** |
| Avskrivingar 01.01.2006 | 0 | 0 | 0 | |
| Avskrivingar 2006 | -7.233.667 | -427.349 | -7.661.016 | |
| **Avskrivingar 31.12.2006** | **-7.233.667** | **-427.349** | **-7.661.016** | |
| **Bókført virði 31.12.2006** | **363.419.605** | **2.777.769** | **366.197.375** | |
| Bókført virði 31.12.2005 | 316.947.420 | 0 | 316.947.420 | |

**Nota 3. Partapeningur**

Partapeningurin er býttur upp í hesar flokkar:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | A-partabræv á | 30.000.000 | 30.000.000 | 30.000 |
| 3 | A-partabrøv á | 32.500.000 | 97.500.000 | 65.000 |
| | | | **127.500.000** | **95.000** |

| | 2006 | t.kr. 2005 |
|---|---|---|
| **Nota 4. Eginpeningur** | | |
| Partapeningur | 127.500.000 | 95.000 |
| | | |
| Flutt úrslit frá undanfarnum árum | -6.111.917 | -3.462 |
| Fluttur partur av úrslitinum í árinum | -34.757 | -2.650 |
| | | |
| Flutt úrslit | -6.146.674 | -6.112 |
| | | |
| **Eginpeningur tilsamans** | **121.353.326** | **88.888** |
| | | |
| **Nota 5. Skattur av ársúrsliti** | | |
| Skattur av ársins skattskyldugu inntøku | 0 | 0 |
| | | |
| Útsettur skattur við ársbyrjan | 0 | 0 |
| Útsettur skattur við ársenda | 0 | 0 |
| | | |
| Skattur í árinum | **0** | **0** |
| | | |
| Skattur goldin í árinum | 0 | 0 |

**Veð- og eventualskyldur**

Felagið hevur 12. november 2003 undirskrivað lánisáttmála við Íleggingargrunnin fyri Føroyar um byggilán kr. 270.000.000. Sum trygd verður veitt skaðaloysisbræv kr. 300.000.000 við 1. veðrætti í tunnilsmunna báðumegin við, herundir veg, til- og frákoyring, øllum installatiónum og annars alt, ið vanliga hoyrir til. Ognar- og matrikuleringsviðurskiftini eru ikki komin uppá pláss við roknskaparárslok 2006.

**Tryggingarviðurskifti**

All Risk Entreprisetrygging:

| | |
|---|---|
| Entreprisetrygging + 30% | 310.000.000 |
| Max. pr. skaða fyri tíðina | 20.000.000 |
| Ábyrgd stjórn og nevnd, max. pr. skaða | 10.000.000 |
| | **340.000.000** |